# 3rd Tórshavn International

*Talv: Komandi fríggjadag verða fyrstu leikirnir leiktir í sterku altjóða talvkappingini sum verður telvað í Norðurlandahúsinum í døgunum 6-14. oktober. Spennandi verður at fylgja gongdini hjá føroysku telvarnum í krútsterku kappingini*



*Besta føroyska kortið, er helst IM John Rødgaard, men hann skal neyvan gera sær vón um at vinna sterku kappingina*

CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Í síðstu viku bleiv sagt at talvkappingin bar heitið Nordic Millennium GM Chess, men 3rd Tórshavn International er rætta navnið. Hetta verður nevnliga tann triðja altjóða talvkapping Talvsamband Føroya skipar fyri. Tann fyrsta varð telvað í Útvarpshøllini í 1986 og tann seinra í 1997 í Norðurlandahúsinum.

Stuðlað kappingini hava Føroya Sparikassi, Føroya Tele, Føroya Shell, Tórshavnar Býráð og Norðurlandahúsið.

**Teir lítlu ímóti teimum stóru**

Føroyingarnir eru allir í niðari helvt av kappingini tá seeding viðvíkur, og fara tí sjálvsagt at hava tað sera trupult ímillum allar stórmeistarnar og hinar sterku telvarnar.

Men vit hava tó vónir. Serliga verður hugsað um John Arna Nilssen, John Rødgaard, Flóvin Tór Næs og Ólavur Simonsen. John Arni er í góðum formi og ætlar sær eisini at yvirraskað. Hann er fyrsta borð hjá føroyingum á Talvolympiaduni, hevur havt góð úrslit í seinastuni og hevur tí tað neyðuga sjálvsálitið og dirvi sum er alneyðugt fyri góðum úrslitum. John Arni er okkara besta boð til ein IM norm.

John Rødgaard er okkar einasti altjóða meistari, og hevur eisini rutinina. Hann hevur mangan megnað frálík úrslit á Olympiadu ímóti tílíkari sterkar mótstøðu, t.d hevur hann leikt javnleik ímóti fyrrverandi heimsmeistarinum Boris Spasskij.

Flóvin og Ólavur hava eisini mangan knógvað sterka mótstøðu, og tykjast at vera vera væl fyri í løtuni. Sum tað sæst á luttakaralistanum so eru 29 nøvn at finna. Orsøkin er, at Eyðun Nolsøe væntandi ikki er við og tað viðførir at ein nýggjur telvari skal finnast fyri at fáa líkatal. Nummar 30 id verður ein føroyingar, verður í hvussu so er á listanum innan kappingarbyrjan.

Vit eru teir lítlu, men vit eiga í hesari kapping ein møguleika, nevnliga at sprongja okkara seeding, og hendan møguleika skulu vit trúgva á. Vit hava gjørt tað fyrr og kunnu gera tað aftur.

**Stórmeistarnir og hinir meistarnir**

Heili ellivu stórmeistarar og fleiri altjóða meistarar luttaka í kappingini. Uttan iva hava góðu virðislønirnar og góðu hentleikarnar telvarnir fáa spælt ein leiklut. 40.000 krónur fær vinnarin.

Luttaralistin er merktur av, at nógvir heilt ungir telvarar eru at finna. Hetta er nýggja talvelitan í fullum blóma.

Ruslan Ponomariov úr Ukraina er bert sekstan ár, men er tann hægstrataði við sínum 2630 ratingstigum. Ein ið eisini er sekstan ár, og komandi superstórmeistari, sum talvelitan kallast, er Alexander Grischuk eisini úr Russland og sanniliga verður at nevna er bert trettan ára gamli Teymur Radjabov. Hann hevur nærum 2500 í rating og er altjóða meistari.

Fleiri norðurlendskir stórmeistarar eru eisini við í hópinum. Hendrik Danielsen umboðar Danmark, úr Íslandi kemur Hannes Stefansson og úr Svøriki navnframi Tiger Hillarp Persson. Eisini eru aðrir norðurlendskir altjóða meistarar ið luttaka.

Sum tað sæst á luttakaralistanum er kappingin sera sterk og tílíkar kappingar gera Føroyar uttan iva enn meira sjónligar á heimskortinum. Talv er sera hent á alnetinum og júst ígjøgnum tann miðilin nógv dúva uppá.

**www.faroechess.com**

Talvsambandið hevur fingið nýggja heimasíðu. Tann gamla heimasíðan, www.sam-teld.fo/talv er tó enn til staðar, men ætlanin er at hendan nýggja heimasíða verður tann almenna síðan. 3rd Tórshavn International verdur fult dekkað á www.faroechess.com, og er eisini sera snøgg og einføld at líta á.

Alt um kappingina finnir tú á heimasíðuni, og undir kappingini verður t.d møguligt at fylgja beinleiðis vid einstøkum talvum.

Høvudsdómari í kappingini verður danin Mogens Nielsen.

3rd Tórshavn International byrjar sum sagt fríggjadagin 6. oktober, og telvað verður hvønn dag frá 13.00. Seinasta umfar, tann 14. oktober, byrjar kl. 11.00.

Luttakaralistin
1. GM Ruslan Ponomariov, UKR 2630
2. GM Vadim Milov, SWI 2626
3. GM Lev Psakhis, ISR 2611
4. GM Alexander Grischuk, RUS 2606
5. GMAlexander Baburin, IRE 2590
6. GM Stanislav Savchenko, UKR 2579
7. GM Hannes Stefansson, IS 2557
8. GM Tiger H. Persson, SVØ 2549
9. GM Stuart Conquest, ENG 2529
10. GM Hendrik Danielsen, DK 2519
11. GM Jonathan Rowson, SKO 2494
12. IM Teymur Radjabov, AZE 2476
13. IM Steffen Pedersen, DK 2464
14. IM Olli Salmensuu, FIN 2458
15. IM Leif E. Johannesen, NO 2422
16. IM Anatoly A. Bykhovsky, RUS 2393
17. FM Johan Eriksson, SVØ 2369
18. IM Jon Viktor Gunnarsson, IS 2368
19. WIM Irina Krush, USA 2354
20. John Arni Nilssen, FO 2354
21. IM John Rødgaard, FO 2351
22. Flóvin Tór Næs, FO 2271
23. Torbjørn Thomsen, FO 2202
24. Ólavur Simonsen, FO 2183
25. Heini Danielsen, FO 2168
26. Terji Petersen, FO 2142
27. Martin Poulsen, FO 2074
28. Carl Eli N. Samuelsen, FO 2055
29. Herluf Hansen, FO 2047

Yngsti luttakarin í kappingini er bert 13 ára gamli IM Teymur Radjabov úr Aserbadjan. Hóast ungur, so hevur hann longu nú heili 2476 rating stig

# Sámal ársins spælari

*Páll Guðlaugsson skal venja Leiftur komandi ár, og tað er rættuliga sannlíkt, at fleiri av føroysku spælarunum halda fram á Ólafsfirði*

Sámal Joensen var besti spælarin á liðnum hjá Leiftri síðsta kappingarár. Tað halda áskoðararnir og stuðlarnir hjá liðnum á Ólafsfirði. Í eini atkvøðugreiðslu eftir kappingarenda góvu tey felstu gøtumanninum flest atkvøður.

Verjuspælarin Hlinur Birgisson varð mettur at vera næstbesti spælarin. Í einari aðrari atkvøðugreiðslu á Ólafsfirði, varð Sámal Joensen kosin at vera næstbesti maður á liðnum. Hlinur Birgisson varð mettur at vera bestur, og John Petersen endaði á triðja plássinum. Tað vóru spælararnir sjálvir, sum stóðu fyri tí atkvøugreiðsluni.



*Sámal Joensen, sum her sæst í dysti fyri landsliðið, er kosin ársins leikari av áskoðarunum hjá Leiftri*

**Páll skal venja**

Føroysku spælararnir á Ólafsfirði hava verið í Føroyum í tvær vikur. Sámal Joensen hevur fyrireikað seg til landsliðsferðina til Sveis og Jugoslavia við at venja við GÍ. John Petersen hevur fyrireikað seg til ferðina við at venja við B36.

Tað hevur leingi ljóðað, at Páll Guðlaugsson komandi ár skal hava ábyrgdina av liðnum hjá Leiftri, og nú skilja vit á lagnum, at avtala fyri komandi kappingarár er gjørd ímillum Páll Guðlaugsson og Leiftur.

Setningurin verður at fáa Leiftur aftur í bestu deildina, har Leiftur og Páll Guðlaugsson stóðu seg so væl í 1998 og í 1999.

Sámal Joensen og John Petersen hava sáttmála við Leiftur í 2001. Vit skilja á lagnum, at rættuliga nógv bendir á, at teir báðir fara yvir aftur á Ólafsfjørðin komandi vár. Vit hava ikki frætt, hvussu tað verður við Jens Martini Knudsen og Jens Eriki Rasmussen.

Teir spælararnir, sum framvegis eru á Ólafsfirði, eru saman við Pálli Guðlagsson farnir at fyrireika seg til komandi kappingarár. Tá veðurlíkindini eru til tað, venja teir uttandura. Um tað er ov kalt og tá kavin argar, venja teir innandura.

JH




Toll- og Skattstova Føroya,
Eysturoyar Øki

**Starv á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki**

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur:** Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, toll, skatt, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv:** Tann, sum verður settur, skal hava roknskaparligan førleika, og skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar, eitt nú merconom, HD o.a., og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða** eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving,
- klokkuskipan við flextíð, og
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðs umhvørvi.

**Setanartreytir:** Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at seta seg í samband við Ingolf Lamhauge, økisstjóra, tlf. 448588.

**Umsóknir:** Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal sendast til

**Toll- og Skattstovu Føroya,**
Eysturoyar Øki,
Postboks 225,
600 Saltangará

**innan 15. oktober 2000.**

**Um stovnin:** Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 16 fólk.



**VÆLLØNT LEIÐARASTARV**

Smoltstøð okkara hevur brúk fyri nýggjum rakstrarleiðara. Til rætta umsøkjaran bjóða vit góða løn og góðar starvstreytir.

**Harafturat bjóða vit:**
- eitt starv í eini fyritøku í støðugari menning
- eitt starv við avbjóðingum
- eitt starv við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning

**Okkara ynski er:**
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú vilt skapa góð úrslit
- at tú hevur ans fyri góðsku
- at tú hevur teldukunnleika

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur hóskandi útbúgving sum t.d. verkfrøðingur, lívfrøðingur ella maskinmeistari. Hetta er tó eingin treyt.

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja 333257/210916 og tosa við Atla Gregersen.

Umsóknarfreistin er 14. oktober 2000

Umsóknirnar, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til:

**P/F Fútaklettur framleiðir laksasmolt, laksarogn og lívfisk. Felagið hevur umboð fyri norsku fóðurfyritøkuna Ewos og hevði í 1999 23 ársverk og ein umsetning uppá 18 milliónir krónur.**

**FÚTAKLETTUR**
360 SANDAVÁGUR
TEL 333 257 · FAX 333 264

SANSIR TEL 355 355



**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. 19[00] til 21[00]

☎ 212380



**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192



**Nýggjar TANNPROTESUR**

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16





**Stóra bringu -ella lítla?**

**Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-støðd?**

**Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína støðd. Ring til okkum og avtala tíð.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820